# LINDA PERRY HEVUR ÚR AT GERA

Fyrrverandi 4 Non Blonde sangarinnan Linda Perry hevur seinastu tíðina havt úr at gera. Hon hevur seinastu árini virkað sum sangskrivari og tónleikafram-leiðari, fyri nøkur av best dámdu poppnøvnunum í heiminum. Seinastu tíðina hevur hon arbeitt við nógvum ymiskum. Størsta partin av árinum í fjør, var hon í upptøkuhølinum við Christinu Aguilera. Linda Perry sigur við Billboard.com, at hon ikki veit hvussu nógv av løgunum vera á komandi fløguni hjá Aguilera, men at tey vísa eina heilt nýggja síðu av Christinu. Fløgan verður væntandi í handlunum í summar.

Umframt Aguilera hevur Perry skrivað tvey løg saman við Dixie Chicks, eitt lag við Cheap Trick og fleiri við Ziggy Marley. Hon hevur harumframt arbeitt saman við tveimum nýggjum nøvnum Ben Jelen og Sierra Swan. Í løtuni arbeiðir Perry saman við Vanessa Carlton, áðrenn hon enn einaferð fer í upptøkuhølið við Courtney Love, at gera eina nýggja fløgu, skrivar Billboard.com



*Linda Perry hevur arbeitt við poppi, rokki, kontri og reggi seinasta árið.*
(mynd:Sheila Rose Hiber)

## HITLIST

### 15 tær bestu (við ÚF-logo)

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Lisberg | Learn To Ride On Waves |
| 2 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 3 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 4 | Kent | Dom som försvann |
| 5 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 6 | Pink | Stupid Girls |
| 7 | Madonna | Sorry |
| 8 | Petur Pólsson | Fremmandur |
| 9 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 10 | Black Eyed Peas | My Humps |
| 11 | Mew | Special |
| 12 | Chris Brown | Run It |
| 13 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 14 | Black Eyed Peas | Pump It |
| 15 | Bryan Rice | No Promises |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Madonna | Sorry |
| 2 | Kashmir | The Cynic |
| 3 | UFO Yepha | Op me håret |
| 4 | Mew | Special |
| 5 | Arctic Monkeys | When The Sun Goes Down |
| 6 | Outlandish feat. U$O | Kom Igen |
| 7 | Sugababes | Ugly |
| 8 | TV-2 | De Første Kærester på Månen |
| 9 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 10 | Bryan Rice | No Promises |
| 11 | Spleen United | Spleen United |
| 12 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 13 | Anden | FAQ |
| 14 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 15 | Franz Ferdinand | Walk Away |
| 16 | Coldplay | Talk |
| 17 | Bob Sinclair ft. G. Pine | Love Generation |
| 18 | Bikstok Røgsystem | Radio |
| 19 | Nephew | Byens Hotel |
| 20 | Magtens Korridorer | Nordhavn Station |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | It's Chico Time | Chico |
| 2 | Pussycat Dolls ft. Will I Am | Beep |
| 3 | Corinne Bailey Rae | Put Your Records on |
| 4 | Madonna | Sorry |
| 5 | Orson | No Tomorrow |
| 6 | Meck ft. Leo Sayer | Thunder In My Heart Again |
| 7 | Feeling | Sewn |
| 8 | Notorius BIG/Diddy/Nelly | Nasty Girl |
| 9 | Shakira | Don't Bother |
| 10 | Chris Brown ft. Juelz Santana | Run It |
| 11 | Westlife | Amazing |
| 12 | The Source ft. Candi Staton | You Got The Love |
| 13 | Ordinary Boys | Boys Will Be Boys |
| 14 | Charlotte Church | Moodswings |
| 15 | Michael Jackson | Rock With You |
| 16 | Fall Out Boy | Sugar We're Goin Down |
| 17 | Keisha White | The Weakness In Me |
| 18 | Hi-Tack | Say Say Say |
| 19 | Freemasons ft. Amanda Wilson | Watchin |
| 20 | Graham Coxon | Standing On My Own Again |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | James Blunt | You're Beautiful |
| 2 | Beyonce ft. Slim Thug | Check On It |
| 3 | Sean Paul | Temperature |
| 4 | Nelly og onnur | Grillz |
| 5 | Mary J. Blige | Be Without You |
| 6 | T-Pain ft. Mike Jones | I'm N Luv |
| 7 | Chris Brown | Yo |
| 8 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 9 | Ne-Yo | So Sick |
| 10 | Cascada | Everytime We Touch |
| 11 | Dem Franchize Boys og onnur | Lean Wit It, Rock Wit it |
| 12 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 13 | Jamie Foxx ft. Ludacris | Unpredictable |
| 14 | The All-American Rejects | Dirty Little Secret |
| 15 | Fall Out Boy | Dance, Dance |
| 16 | Busta Rhymes | Touch It |
| 17 | Pink | Stupid Girls |
| 18 | The Black Eyed Peas | Pump It |
| 19 | Chris Brown | Run It |
| 20 | Kelly Clarkson | Because Of You |

sound

# CHER KEYPIR EITTKAMARS ÍBÚÐ FYRI 28 MILLIÓNIR



*Cher keypir íbúð, ið liggur tættari arbeiðsplássinum Hollywood*

Song- og sjónleikarkvinnan Cher hevur sambært National Post goldið 28 milliónir kr. fyri eina eittkamars íbúð í Sierra Towers í vestur Hollywood. Talan er tó um eitt kamar, sum er 223 fermetrar, á onkran hátt deilt yvir tvær hæddir. So hetta er ikki ein pinkalítið kamar,

Cher er ikki einasta kenda andlitið, ið seinastu tíðina er flutt inn í Sierra Towers. Bæði Lindsay Lohan og Matthew Perry hava fyri stuttum keypt íbúð í háhúsinum. Háhúsið hevur óspilt útsýnið av hvørjari hædd. Hvør íbúð hevur ein hálvan triðja metur breiðan altan. Tað ljóðar tó ikki, at Cher ætlar sær at flyta í íbúðina. Hon býr vanliga í Malibu. Men íbúðin er góð at hava, tá hon er til arbeiðis í Hollywood.

# VILT TÚ LUKTA DESPERAT?

Merchandising er ein risavinna, og sjónvarpsrøðin Desperate Houswives roynir eisini at vinna nøkur oyru á hendan hátt. Nýggjasta tiltakið hjá framleiðarunum av sendirøðini, er luktilsi, ið luktar sum tær ymisku kvinnurnar, ið eru við í sendirøðini.

Talan um seksutt luktilsi, ið luktar av Wisteria Lane, har allar tær desperatu húsmøðurnar búleikast, og sum onkursvegna fangar luktin av teimum ymisku kvinnunum. Sjónvarpsrøðin er so mikið væl dámd, at eingin ivi er um, at hetta verður ein brakandi success, siga fólkini aftan fyri ætlanina við The Sun. Væntandi kemur luktilsi á marknaðin í summar.



*Nú fer at bera til at lukta sum kvinnurnar á Wisteria Lane*

# SUGABABES Á PALLI OG FLØGU VIÐ AMMELLE




Nýggja stakfløgan hjá Sugababes eitur Red Dress.

Í vikuskiftinum spældi enski gentubólkurin Sugababes fyrstu konsertina við nýggja liminum í bólkinum Ammelle Berrabah. Ummælini av konsertini, ið var partur av tiltiknu G.A.Y. konsertunum í London Astoria eru sera jalig, og røddin hjá Ammelle verður umrødd, sum sera góð.

Upprunaligu limirnir Keisha Buchanan og Heidi Range tykstust aftan á konsertina eisini sera væl nøgdar við framførsluna hjá nýggja liminum, skrivar The Sun. Mánadagin kom so fyrsta stakfløgan síðan útskiftingina av triðja liminum í bólkinum. Stakfløgan eitur Red Dress, hana fara vit ivaleyst at hoyra ofta.